# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI NEYSTAØKI Á SUNDI

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

## § 1. ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 er matr. 4c, Hoyvík

## § 2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa økið til bygging av neystum og bátadrátt á Sundi

Stk. 2. Økið matr. nr. 4 c, Hoyvík er uml. 31.000 $m^2$ til støddar og liggur í umráðispartinum E í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Orsaka av at nakað av tilfarið er fylt út á sjógv í sambandi við virksemi á ognini sum grótbrot, er tann veruliga støddin av økinum uml. 35.000 $m^2$.

Stk. 3. Umráðsiparturin E er lagdur til smábáta-, frítíðar-, og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera. Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Møgulig er at víðka øki móti sjónum við uppfylling sambært kortskjali I treytað av at neyðugu loyvini fyriliggja.

Stk. 5. Frárenning og reinsing av frárensluvatni skal gerast sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu

Stk. 6. Atkomuvegur verður frá landsvegnum sum merkt á kortskjali I.

Stk. 7. Ruskpláss við bingjum til skiljing av burturkasti skulu staðsetast soleiðis, at fjarstøðan til einstøku neystaeindirnar er í mesta lagi 100 m.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

Økið skal býtast upp í eindirnar

Stk. 1**.** Neystabygging

Stk. 2. Felagsøki til felagshús, goymslu, bátavaskipláss og almenn WC.

a) Felagsøki skal í minsta lagi verða 3.500 $m^2$ ella 10% av samlaða økinum.

Stk. 3. Bátahylur við bátadrátti

## § 4.VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegatgongd til øki frá landsvegi merkt á kortskjali I.

Stk. 2. Vegatgongd skal lúka krøv frá Tórshavnar kommunu og Landsverk.

Stk. 3. Vegir inni á økinum skulu vera í minsta lagi 6 m breiðir.

Stk. 2. Parkering til í minsta lagi 1,5 bilar fyri hvørt neyst.

Stk. 3. Parkering skal skipast í felags parkeringsøkir.

## § 5. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

Stk. 1. Mest loyvda byggistig 0,4

Stk. 2. Mest loyvd hædd á bygningum 10 m

Stk. 3. Bygging og ferðsluøkir skulu tryggjast ímóti gróti sum møguliga dettur úr berginum við eini passandi frástøðu frá berginum, sum skal skjalprógvast, og/ella við trygging av berginum.

Stk. 4. Felagsøki og bátahylur skulu liggja í sambandi við hvørt annað.

Stk. 5**.** Farvegir frammanfyri neystahurðar skulu verða minsta lagi 15 m breiðir.

## § 6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging og nýbygging.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.